# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
eirikur@sosialurin.fo



# SPJADD ANDSTØÐA VERJIR LØGMANN

Óskipaða stríðið á tingi og í politisku skipanini annars er afturvendandi hesa ársins tíð. Stríðið snýr seg um, hvørt vit skulu trúgva lívfrøðini, ella um vinna og politikarar vita betur, hvussu fiskurin nørist á grunnum okkara.

Skerjingar eru kortini gjørdar seinastu árini, so vit kunnu siga, at tað gongur rætta vegin. Men eins og vit vit hava víst á fyrr, so eru fyrilitini so ymisk. Politikarar skulu velja ímillum leiðina hjá fiskimonnum, har talan kanska er um løtuvinning - ella leiðina hjá fiskifrøðingunum, sum førir til eitt tap í fyrstu syftu. Verður trýstið skert so nógv, sum fiskifrøðingarnir mæla til, ja so fer at svíða fyrstu tíðina, men sambært hesi serfrøði, so fer tað at løna seg aftur í ríkiligt mát, tá stovnarnir koma fyri seg aftur, og vit við einum minni flota kunnu fiska meira og betri fisk.

Men politiska telvingin, sum vit hava verið vitni til seinastu dagarnar ber ikki boð um dygdargott politiskt handverk. Vit sóu tveir sambandsmenn, sum tóku undir við andstøðuuppskotinum undir aðru viðgerð. Hetta fall ikki í góða jørð hjá løgmanni, sum skírdi Edmund Joensen og Magna Laksafoss populistar.

Við triðju viðgerð í gjár lupu enn fleiri samgongupolitikarar frá og nærkaðust andstøðuni. Uppskot teirra um at skerja fiskidagarnar við átta prosentum kundi verði samtykt - og soleiðis kundi samgongan komið í vanda. Tað ljóðaði úr tinginum, at Fólkaflokkurin hevði sett hetta málið sum eitt kardinalpunkt - um málið ikki varð samtykt, so var eingin samgonga, segði onkur fólkaflokksmaður í gongini í løgtinginum.



Tað var í hesum stríði í 2008, at Høgni Hoydal, formaður í Tjóðveldi boðaði frá, at um flokkur hansara ikki megnaði at standa saman í hesum máli, so var Tjóðveldi ikki ein stjórnarberandi flokkur. Hetta megnaði Tjóðveldi ikki - og fáar vikur seinni varð hann koyrdur á dyr úr Tinganesi.

Hesaferð megnaði Tjóðveldi heldur ikki at standa saman sum ein flokkur. Heini O. Heinesen atkvøddi ikki saman við floksfeløgum sínum, og tað var beinleiðis orsøkin til, at broytta uppskotið hjá Jacob Vestergaard varð samtykt.

Tað er ein marghátlig støða: Samgongan hevur ikki meiriluta í tinginum, men av tí at andstøðan ikki stendur saman - og av tí at tingmanningin hjá Tjóðveldi ikki dregur eina línu, so kann samgongan halda fram við at sigla millum ósamdu skerini í andstøðuni.

**Løgmaður skírir partamenn at vera sjálvsøknar populistar**

# Fleiri lurta eftir Rás2

Skulu vit trúgva atkvøðugreiðsluni Pulsinum á Portalinum, so hevur Rás2 fleiri lurtarar enn útvarpið hjá Kringvarpinum.

Pulsurin er ein sokallað QuickPoll kanning, har fólk í hesum føri verða spurd, hvørji av teimum trimum føroysku útvarpsrásunum, tey hava lurtað eftir í summar.

Tá svarað varð 2.179 verðir var støðan hendan:

| | |
|---|---|
| **Kringvarpið** | **45%** |
| **Rás2** | **47%** |
| **Lindin** | **8%** |



*Annika Mittún Jacobsen í útvarpsstovuni hjá Rás2*

Slíkar kanningar skulu sjálvandi altíð takast við øllum fyrivarnum. Men kortini vísir hendan kanningin, at munurin millum privatu Rás2 og almenna Kringvarpið, sum bæði krevur skatt inn og soleiðis við skattapengum í rygginum kappast við privatu miðlarnar um handilslýsingar, als ikki stendur mát við tann munin, sum er í kostnaðinum av at reka útvarpsstøðirnar.

# John harmast Mikkjal



- Eg eri vónbrotin av, at Mikkjal Sørensen ikki atkvøddi saman við Javnaðarflokkinum um at lækkafiskidagarnar átta prosent.

Hetta segði formaður Javnaðarfloksins á tingi, í Degi og viku í gjár.

John Johannessen segði, at tey í Javnaðarflokkinum eru so von við at Gerhard Lognberg ikki atkvøður saman við tingbólkinum, men at hann hevði roknað við at øll hini fimm fóru at standa saman.

- Serliga undrar støðan hjá Mikkjali Sørensen meg, tí hann hevur funnist at vinnunevndaruppskotinum, tí tað skerjir trolaraflotan í Suðuroy niður á 900 dagar, meðan okkara uppskoti legði 30 dagar omanáaftur - hetta fult í tráð við fiskivísund, segði John Johannessen.

Formaður Javnaðarfloksins á tingi vísti á, at tað er neyðugt at gera nakað við fiskivinnuna, sum er grundsúlan undir samfelagnum.

- Alla staðni frá verður víst á, at verulig tøk mugu takast fyri at fáa fiskivinnuna upp á beint. Vit eiga at fylgja fiskifrøðini so nær sum til ber, og her høvdu vit eina breiða semju millum fleiri flokkar, men tað miseydnaðist, staðfesti John Johannessen.



**ABC blokkar oyruni**

BJØRT SAMUELSEN
KJAK Á SÍÐU 12



**Ongantíð áður so nógv tilboð**

HELENA DAM Á NEYSTABØ
KJAK Á SÍÐU 12

# Telja ikki Heina við longur



Heini O. Heinesen er ein outsidari í Tjóðveldi. Hann telur ikki við. Hóast Tjóðveldi hevur átta tingfólk, so telja bara sjey teirra við. Hetta segði Høgni Hoydal eftir tingfundin í gjár, tá Heini O. Heinesen bjargaði samgonguni.

Sjálvur sigur Heini O. Heinesen, at hann er ósamdur við sín egna flokk. Hann trýr ikki uppá, at vit kunnu regulera veiðitrýstið á henda hátt, tí flotin má minka eftir búskaparligum fortreytum, sigur hann.

Tjóðveldi hevur annars á landsfundi einmælt samtykt fiskivinnupolitikkin, sum tey sjey standa fyri, og tí viðganga tey sjey tjóðveldistingfólkini, at Heini O. Heinesen, sum gongur ímóti einum heilum flokki, er eitt problem.

Í Degi og viku í gjárkvøldið segði Høgni Hoydal, at tað langt síðani hevur fingið avleiðingar, at Heini O. Heinesen gongur ímóti flokkinum.

- Hetta kostaði CHE samgonguni lívið, og hetta bjargaði kanska sitandi samgongu. Men Heini O. Heinesen telur ikki við longur, tað vita øll, so tað var ikki trupulleikin í dag, segði hann.

Høgni Hoydal heldur tí, at stóri trupulleikin í tinginum í gjár var, at Sjálvstýrisflokkurin atkvøddi saman við samgonguni - og harvið bjargaði samgonguni.

**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo